

SLITIÐ KOT *Sagt verður, at Høgni Hoydal er slitin. Hetta er púra rætt. Men hann hevur eisini í seks ár staðið á odda í stríðnum fyri føroyskum sjálvræði. Nógv er gjørt. Og nú eru 24 mál klár at yvirtaka, eins og Grundlóg Føroya er um at vera liðug. Skulu vit lata alt fara fyri skeytið nú?*

# SJÁLVSTÝRISKÓSIN SKAL HALDAST

Í seks ár hevur Tjóðveldisflokkurin lagt støði undir einar sjálvstøðugar Føroyar.
Búskaparligu, sosialu, vinnuligu og mentanarligu framstigini hava ongantíð fyrr verið so stór.
Fleiri málsøki eru yvirtikin, og klárt er at yvirtaka 24 afturat.
Teirra millum eru fólkakirkjan, løgreglan og rættarskipanin.
Fyrireikingarnar til Grundlóg Føroya eru eisini um at vera lidnar.
Klárt er at taka størsta stig móti sjálvræði, síðani vit fingu heimastýrið í 1948.
Tjóðveldisflokkurin vil fremja yvirtøkurnar og seta Grundlóg Føroya í verk.
Men Sambandsflokkurin stendur til at vinna, og vandi er fyri, at alt fer fyri skeytið.

**Ein atkvøða** fyri Tjóðveldisflokkinum
er ein atkvøða fyri, at sjálvstýriskósin heldur fram.

E

TJÓÐVELDISFLOKKURIN

VEL FRAMTÍÐINA!

www.tjodveldi.fo





# Nú er tann stundin komin til handa...



Valskráin og tað, ið Fólkaflokkurin stendur fyri, er ikki broytt seinnu árini. Hóast mangan baldrut í landsbúskapi og innan tinggátt halda vit kósina og fara siðiliga, men áhaldandi at arbeiða fyri at røkka longu settum málum.



Flokkurin fer í einari komandi samgongu at leggja dent á niðanfyrinevndu evni:

- Í okkara samfelag skulu vit sjálvi ráða. Vit skulu virka fyri at fáa ein sjálvberandi búskap og harvið valda har, sum vit gjalda.
- Føroyar eru fyri allar føroyingar. Við atliti at lívsgóðskuni hjá tí einstaka skulu vit virðiliga taka hjálpa teimum ið ikki sjálvi megna tað.
- Tað almenna skal verja frælsið hjá tí einstaka, so hann undir persónligari ábyrgd kann røkka sínum lívsmálum. Tann einstaki føroyingurin skal hava frælsi og rásarúm til sjálvur at leggja sær lívið til rættis eftir hegni og dugnaskapi.
- Vit skulu stremba eftir at skapa varandi karmar fyri einum fjøltáttaðum vinnulívi soleiðis, at leggjast kunnu langtíðar ætlanir, ið skapa íløgutrygd. Vit skulu styrkja kappingarførið hjá vinnulívinum við at tillaga skatta- og avgjaldstrýstið.
- Vit miða eftir einari lógarfestari eftirlønartrygging fyri allar borgarar í landinum.

Fólkaflokkurin hevur seinnnu árini framt stórmál, og vit ætla ikki at steðga her.
Eg fari sum formaður floksins at heita á teg um at taka væl móti valevnum okkara og velja ein sterkan Fólkaflokk inn á Føroya Løgting.

Anfinn Kallsberg

XA

FÓLKAFLOKKURIN

*Ábyrgd, álit og áræði*

team85 358000